Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesi› eisini ítróttin á alnetinum
www.sosialinum.fo

Statoil kring Føroyar

Jens Glerup, ein av fyrireikarunum av Statoil kring Føroyar 2000, leg›i ætlanirnar fram á tí›indafundi í HB húsinum

Árliga súkklukappingin hjá Tórshavnar Súkklufelag, sum allir føroyskir súkklarar síggja fram til, fer av bakkastokki um tvær vikur. Fleiri danskir og føroyskir súkklarar fara tá á føroysku vegirnar at kappast í størstu súkklukappingini her á landi

STEFAN Í SKORINI

Fimta ári› á ra› skipar Tórshavnar Súkklufelag saman vi› Statoil fyri súkklukappingini Statoil kring Føroyar, sum ver›ur í døgunum 19.-23. juli. Hetta er ein etapu kapping, skipa› eins og Tour de France. Mannagongdin ver›ur stórt sæ› tann sama sum í fjør, tá i› kappingin var› sera væl eydna›. Byrja› ver›ur tann 19. juli vi› einum prologi í Klaksvík, og sí›ani ver›a etapur í Eysturoynni, Sandoynni, Su›uroynni og Streymoynni. Tí›irnar frá hvørjari etapu ver›a lagdar saman og vinnarin funnin út frá teimum. Tann súkklarin, sum førir í samla›u kappingini, ver›ur í eini bláari føraratroyggju vi› Statoil merkinum á. Súkklararnir koma á mál á Statoil stø›unum á sta›num, har skipa› ver›ur fyri ymiskum undirhaldi. Tilsaman leggja súkklararnir umlei› 300 km afturum bak.

Súkklararnir

Undanfarnir vinnarar av kappingini eru Bogi Christiansen og Rógvi Johansen, men bert Rógvi Johansen ver›ur vi› sum súkklari í ár. Bogi Christiansen er ein av fyriskiparunum av kappingini.

Rógvi Johansen er favorittur at vinna kappingina, og ta› gav hann eisini eina gó›a ábending um á Jóanssøku, tá i› hann vann kappingina har sera sannførandi. Rógvi Johansen vann kappingina í fjør og byrjar tí í bláu føraratroyggjuni.

Eins og í fjør luttaka fleiri súkklarar úr Danmark, og nakrir av teimum skuldu kunna givi› Rógva gó›a kapping. Her er serliga talan um Simon Borchman, sum inntil í fjør var professionellur súkklari hjá Team Chicky World í Århus, har Rógvi Johansen eisini hevur veri›, tó bert sum amatørur. Hin danski súkklarin, sum føroyingar vænta sær nógv av, er Jørgen Andersen. Hann er í A-klassanum ni›ri í Danmark, so ta› er ey›sæ›, at hann ger eitt sindur um seg. Jørgen Andersen er tó ikki væl egna›ur til ta› slagi› av kapping, sum Statoil kring Føroyar er. Teir danir, sum vóru vi› í fjør, hava lati› sera væl at kappingini, og tí er tali› av dønum í kappingini aftur í ár stórt.

Teir føroysku súkklararnir, sum væntast kann mest av umframt Rógva Johansen, eru Gunnar Dahl Olsen og Jóhan Brend. Jóhan Brend súkklar í løtuni vi› Gladsaxe ni›ri í Danmark, og hann hevur ongantí› veri› í betri venjing enn júst nú. Jóhan Brend klárar seg vanliga best í einkultstarti.

Gunnar Dahl Olsen er kanska besti súkklarin her heima í Føroyum í løtuni, og hann fylgdi Rógva Johansen longst á Jóanssøku. Gunnar hevur júst veri› í Danmark og luttiki› í Sjælland Runt, har hann gjørdist nummar seks í C-klassanum, og ta› er hansara besta úrslit higartil.

Súkklufelagi› gjørdi eina roynd at fáa súkklarar a›rasta›ni frá at ver›a vi› í kappingini, men hetta miseydna›ist. Ætlanin var annars, at súkklarar av Ynes Mon og úr Hetlandi skuldu koma hendanvegin.

Økta virksemi› hjá Súkklufelagnum hevur vi›sær, at í ár eru fleiri ungir súkklarar vi› í kappingini. Eisini er ein genta vi› í kappingini, og ta› er fyrstu fer› í Statoil kring Føroyar.

Gjørt heimasí›u

Í sambandi vi› Statoil kring Føroyar hevur Tórshavnar Súkklufelag gjørt eina heimasí›u á internetinum, sum er at finna á tsf.fo. Har ber til at finna allar uppl‡singar um kappingina. Rutturnar, sum súkkla› ver›ur á, og eisini eru uppl‡singar um teir einstøku súkklararnar at finna har. Sí›an er eisini ætla› teimum donsku súkklarunum, sum koma hendanvegin, og tí er hon eisini á donskum máli. Teir danir, sum luttóku í fjør, vóru ikki nóg væl fyrireikarir til kappingina, men tí hava teir so møguleika fyri hesufer›.

GÍ fer til Danmarkar

Steypavinnararnir fara í komandi viku til Lemvig at fyrireika seg til Europa Cup og landskappingina

Fótbóltshuga›u gøtufólkini hava ofta frøtt seg um FM sigrar og sigrar í steypakappingini. Tá tey komu aftur úr Gundadali sunnudagin bendi einki á, at talan so at siga var um uppafturkók. Gle›in um lutabrævi› í løgmanssteypinum var stór, og ta› var ikki at undrast á. A›rar fer›ir hevur GÍ veri› favorittur. Hesa fer› var HB favorittur.

Men gøtumenn hvíla ikki á steypasigrinum. Málini fyri ta›, sum er eftir av hesum kappingarárinum, eru at arbei›a seg so langt upp eftir stigatalvuni, sum ta› ber til, og at standa seg væl í Europa Cup kappingini.

GÍ skal spæla ímóti svenska vinarb‡num hjá Klaksvíkini, Norkõping. Fyrri dysturin, sum ver›ur á heimavølli skal sambært skránni spælast 10. august.

Gøtumenn hava fleiri fer›ir veri› í Danmark á venjingarlegu í summarste›ginum, og solei›is ver›ur ta› eisini í ár. 20 spælarar fara annan fríggjadag vi› Norrønu. Saman vi› konum og børnum skulu teir halda frí, venja og spæla dystir í Lemvig, har teir hava veri› tvær fer›ir á›ur.

Gøtufólkini vera aftur í Føroyum mánadagin 26. juli.

Nú mánadagin ver›ur venjarin hjá GÍ, Johan Nielsen, 60 ár. Í tí sambandinum bjó›ar GÍ til móttøku í GÍ húsinum seinnapartin í morgin.

jh

Unglingarnir knúsa alla mótstø›u

U–17 landsli›i› hevur vunni› stórt í øllum innlei›andi dystunum í 100 ára kappingini hjá t‡ska fótbóltslandsli›num

Ta› ljó›ar heilt vi› sí›una av, og venjarin, Jógvan Martin Olsen, ásannar, at mótstø›an í fyrsta dystinum var einki serlig. Men ta› er ein veruleiki, at føroyska U–17 landsli›i› í fyrradagin vann tveir dystir í Leipzig, har ein altjó›a kapping er í hesi vikuni. Ta› er t‡ska fótbólts sambandi›, sum hevur bjó›a› til kappingina, i› er ein partur av drúgva hátí›arhaldinum í sambandi vi›, at eitt hundra› ár eru li›in sí›ani t‡ska fótbóltssambandi› var› sett á stovn.

Ta› ver›ur kappast í tveimum aldursbólkum. Føroysku dreingirnir, sum eru føddir í 1983 og í 1984, kalla li›i› hjá sær Atlantic. Í teirra aldursbólki luttaka umlei› hálvt hundra› li›, sum eru flokka› í bólkar vi› f‡ra li›um í hvørjum.

Føroyska li›i› spældi tveir dystir í fyrradagin. Fyrrapartin í gjár spældu teir sí›sta innlei›andi dystin. Tvey li› komu ví›ari úr hvørjum bólkinum, og longu undan dystinum í gjáramorgunin var ta› greitt, at føroysku dreingirnir høvdu vunni› bólkin.
Í gjárkvøldi› var fari› undir endaumfari›. Tá var talan um cup dystir. Ta› vil siga, at um føroysku dreingirnir vunnu, so komu teir ví›ari. Um teir taptu, so vóru teir sendir úr kappingini. Sí›stu dystirnir ver›a spældir í anna›kvøld.

Stórsigurin

Dystartí›in er tvær fer›ir ein hálvan tíma. Fyrrapartin t‡sdagin spældu føroysku unglingarnir ímóti FSV Tapter Leipzig 1990. Talan man ivaleyst vera um eitt av mongu fótbóltsfeløgunum í Eysturr‡skalandi, sum – eftir at kommunistarnir høvdu mist valdi› – fekk n‡tt navn.

Tá ta› sn‡r seg um at spæla fótbólt, høvdu hesir eysturt‡sku unglingarnir líti› upp á seg. Føroysku dreingirnir vóru eitt sindur varnir fyrstu løtuna, men tá teir høvdu funni› út av, at teir vóru so nógv betri í øllum lutum, vundu teir burturúr teimum. Úrsliti› var 11–0, eftir at stø›an í stutta ste›ginum var 2–0.

Elfinn Ørvarodd setti hol á í 10. minutti, og so var Bjarni Jørgensen orduligur skarpskjútti. Hann skora›i f‡ra mál á ra›: í 15., 35., 36. og 40. minutti. Gilli Haraldsen økti til 6–0 í 42. minutti. Mótstø›uli›i› var í upployusn , føroysku unglingarnir brúktu sínar royndir úr 1. deild og royndunum, sum teir hava fingi› í u–16 landsdystum, og teir skora›u aftur í 43., 45., 47., 52. og 55. minutti. Tey málini skora›u Hanus Eliasen, Vagnur Mohr Mortensen, Hanus Eliasen, Fró›i Jóanesarson og Jón Rói Jacobsen.

– Eg sá hini bæ›i li›ini spæla, og tí vóru vit grei›ir yvir, at mótstø›an fór at vera væl størri í hinum bá›um dystunum, sigur Jógvan Martin Olsen úr Leipzig. Hann er væl nøgdur vi›, at dreingirnir vísa hugbur›in, sum skal til, sjálvt um umstø›urnar ikki eru, sum tær plaga at vera, tá teir luttaka í EM undankappingum. Teir búgva í telti, og kunningarstø›i› er als ikki ta›, sum teir eru vanir vi›.

Framvegis einki fari› ígjøgnum

Í seinna dystinum í fyrradagin – hann var klokkan f‡ra seinnapartin – vunnu føroyingar 4–0, sum eisini var stø›an í hálvleikinum. Mótstø›uli›i› ta fer›ina var Iurdumspor úr Turkalandi.

– Okkara dreingir spældu sera væl, og málini vóru avbera gó›. Ta› fyrsta stúta›i li›forma›urin, Símun Joensen, upp undir samankomingina eftir gott uppspæl í sí›uni og fínt innlegg. Hetta var í 20. minutti, og tríggjar minuttir seinni økti Gilli Haraldsen vi› gó›um skoti. Tveir minuttir seinni var Bjarni Jørgensen skrásettur málskjútti. Hann var fystur á, eftir at málverjin hev›i hálvbjarga› roynd frá Elfinni Ørvarodd. Símun Joensen skora›i sí›sta máli› beinlei›is upp á fríspark í 28. minutti, grei›ir Jógvan Martin Olsen frá.

Fyrrapartin í gjár spældu føroysku unglingarnir ímóti ABJ Football úr Aberdeen. Føroyska li›i› vann 3–1, eftir at stø›an í hálvleikinum var 2–1. Í gjárkvøldi› klokkan átta var aftur ein dystur á skránni, men á middegi í gjár vistu teir ikki, hvat mótstø›uli›i› fór at vera.

Jógvan Martin Olsen sigur úr Leipzig, at størsta mótstø›an var í gjár. Regni› oysti ni›ur, skotarnir spældu har›liga, og dómarin gav teimum loyvi at takla ófantaliga:

– Gilli Haraldsen setti hol á í 12. minutti. Vi› fremra stólpa var hann fyrstur á fløtum innleggi. Símun Joensen økti í 18. minutti vi› fínum heilfluktara, eftir uppspæl yvir allan vøllin, sum enda›i vi›, at Jann Ingi Petersen leg›i flatt innfyri úr høgru. Teir minka›u um munin í sama minutti. Jón Rói Jacobsen fekk ikki tamarhald á langari skotskari sending, og so gjørdist ein púra leysur. Í 53. minutti slerdi Hanus Eliasen sigurin fastan. Skotarnir høvdu horna, og okkara dreingir fóru í snarálop. Hjalgrím Elttør setti fer› á, diagonalsending út í vinstru enda›i vi›, at Jann Ingi Petersen leg›i innfyri, og Hanus var fyrstur á, sigur ein væl nøgdur venjari, sum letur heilsa heima, at øll í fer›alagnum hava ta› gott.

Onkrir smásnuddir vóru í gjár. Sigrun Danielsen, fysioterapeutur, rokna›i kortini vi›, at allir spælararnir fóru at ver›a tøkir, tá næsta uppgávan var á skránni í gjárkvøldi›.

Li›i›

Í tveimum teimum fyrstu dystunum høvdu føroyingarnir somu byrjunaruppstilling. Teir fyrstu ellivu vóru Pól Næs Joensen, B36 – Jann Ingi Petersen, B68, Vagnur Mohr Mortensen, HB, Jón Rói Jacobsen, HB, Áki Leitisstein Hansen, NSÍ – Gilli Haraldsen, Haderslev, Hjalgrím Elttør, KÍ, Símun Joensen, li›forma›ur, KÍ, Elfinn Ørvarodd, FS Vágar – Bjarni Jørgensen, HB, Fró›i Jóanesarson, NSÍ.

Fyrrapartin í gjár var einasta broytingin sammett vi› tvær tær fyrru fer›irnar, at Hanus Eliasen byrja›i í álopinum, og at Bjarni Jørgensen var á beinkinum.

Í tí fyrsta dystinum vór›u tríggjar útskiftingar gjørdar. Í 36. minutti komu Atli Danielsen, KÍ, og Hanus Eliasen, ÍF, á vøllin fyri Hjalgrím Elttør og Bjarna Jørgensen, og í 45. minutti kom Frank Poulsen, HB, inn fyri Áka Leitisstein Hansen.

Í næsta dystinum var› málverjin skiftur í ste›ginum. Tá avloysti Arnfinn í Bartalsstovu, GÍ, Pól N. Joensen. Samstundis kom Bár›ur Christiansen, HB, inn fyri Jann Inga Petersen. Í 45. minutti kom Frank Poulsen, HB, inn fyri Gilla Haraldsen.

Í gjáramorgunin kom Bár›ur Christiansen á vøllin í 31. minutti fyri Áka Leitisstein Hansen. Símun Joensen fór út í 36. minutti, og Atli Danielsen kom inn, og í 39. minutti avloysti Frank Poulsen Elfinn Ørvarodd.

jh

HM upp á pláss í dag

Í gjár bendi nógv á, at HM endaspæli› í 2006 ver›ur í Su›urafrika, og at serliga Ongland fór at kenna seg at sita eftir vi› svarta peri

Ta› hevur veri› serliga nógv politiskt virksemi í altjó›a fótbóltsheiminum tær sí›stu vikurnar. Orsøkin hevur veri› tann, at a›alnevndin hjá FIFA fyrrapartin í dag skal gera av, hvør skal vera vertur fyri HM endaspælinum, sum ver›ur í 2006.

Forma›urin í FSF, Torleif Sigur›sson

Fótbóltssamband Føroya hevur onga beinlei›is ávirkan á, hvar endaspæli› ver›ur. Men ta› var ikki frítt, at forma›urin í FSF, Torleif Sigur›sson, og a›alskrivarin, Ísak Mikladal, kendu farran av korridor politikkinum, tá teir sí›sta vikuskifti vóru í Rotterdam á a›alfuni hjá UEFA. Teir heilsa›u m.a. upp á Franz Bechenbauer, sum hev›i nógv at gera í royndini at fáa europearanar at stu›la t‡sku umsóknini.

Fleiri hava ligi› framvi› at fingi› vertsskapin, sum ver›ur mettur at vera stórur hei›ur og eitt sera stórt fíggjarligt íkast fyri vertirnar. Brasilia hevur veri› framvi›, men teir hava bo›a› frá, at teir hava tiki› sína umsókn aftur, og at teir í sta›in stu›la Su›urafrika. Endaspæli› hevur ongantí› á›ur veri› í Afrika, og umframt Su›urafrika hevur Marokko eisini ligi› framvi›.

Í 2002 ver›ur endaspæli› í Su›urkorea og Japan. Tí eru eingi lond úr Asia ímillum tey, sum halda seg framat. Í 1998 var endaspæli› í Fraklandi. Men í fótbóltshøpi halda europearar nógv um seg sjálvar. Bæ›i T‡skaland og Ongland hava bjó›a› seg fram.

Tann sí›sta fótbóltspolitiska telvingin um vertsskapin gongur fyri seg í Zurich, har FIFA hevur høvu›skrivstovu. Fyrrapartin í gjár fingu umbo› fyri tey f‡ra fótbóltssambondini tjúgu minuttir í part at sannføra a›alnevndina í FIFA um, at ta› er best fyri fótbóltin, at júst gerast vertir fyri endaspælinum.

Ongland hevur m.a. brúkt Bobby Charlton at sannføra teir 24 a›alevndarlimirnar um, at ta› er best fyri fótbóltin, at endaspæli› ver›ur í Onglandi. T‡skaland hevur brúkt Franz Beckenbauer, Brasilia brúkti Pele, og trumfurin hjá Su›urafrika hevur veri› Nelson Mandela.

T‡skararnir hava givi› til kennar, at teir kenna seg eitt sindur sn‡ttar av Onglandi. T‡skarar halda, at tá teir stu›la›u Onglandi í teirra væl eydna›u roynd at fáa EM endaspæli› í 1996 til Onglands, so var ta› tí, at ta› lá í kortunum, at Ongland skuldi stu›la t‡sku royndini at gerast vertur fyri HM endaspælinum í 2006. Eingin skrivlig avtala er um hetta, og í Onglandi siga teir seg ikki vita naka› um avtaluna.

Í gjár var› mett, at ta› var mest sannlíkt, at HM endaspæli› í 2006 ver›ur í Su›urafrika, og um ta› ikki ver›ur har, so ver›ur ta› í T‡skalandi. Talan kann gerast um rættuliga tætta og spennandi atkvø›ugrei›slu í dag. Í gjár var› møguleikin nevndur, at tólv fara at atkvø›a fyri Su›urafrika, og at tólv fara at atkvø›a fyri T‡skalandi. Um úrsliti› ver›ur solei›is, so ver›ur atkvø›an hjá formanninum í FIFA, sveisaranum Sepp Blatter, avgerandi.

Í a›alnevndini hjá FIFA eru 24. Átta teirra umbo›a UEFA, og í gjár bendi alt á, at bretski umbo›sma›urin, sum er úr Skotlandi, fór at vera einasti europearin, i› fór at atkvø›a fyri Onglandi.

jh